KVENNA- OG BARNASVIÐ

LANDSPÍTALI
HÁSKÓLASJÚKRAHÚS

# Lívmóðurtøka við undirlívskurði
## Upplýsingar til sjúklingar

**Upplýsingarnar niðanfyri eru ætlaðar kvinnum, sum fáa lívmóður tikna við skurðviðgerð á kvinnudeild 21-A á Landhospitalinum-universitetssjúkrahúsinum í Reykjavík.**

Høvuðsorsøkirnar til at lívmóður má verða tikin eru góðkynjaðar sjúkur í lívmóðurini, eitt nú óreglulig og ógvuslig bløðing, sjúnkað lívmóður ella góðkynjaðir vevnaðarknyklar í lívmóðurini. Í summum førum kann talan vera um illkynjaðar broytingar.

## Fyrireiking til skurðviðgerð

Fyrireiking og vegleiðing undan skurðviðgerð er umráðandi. Starvsfólk á deildini fær teir neyðugu upplýsingarnar frá tygum til at meta um heilsustøðu tygara og fyrireika uppihaldið á deildini.

### Viðtala við lækna

Læknin fær upplýsingar frá tygum um, hvussu heilsustøða tygara hevur verið og journalførir tær. Hann greiðir tygum frá skurðviðgerðini, og hvat tygum kunnu vænta. Tygum mugu vátta skrivliga, at tygum samtykkja at leggjast undir skurð, um tað ikki longu er gjørt. Blóðroyndir verða tiknar, og læknin ætlar um, hvørt neyðugt at gera fleiri og gjøllari kanningar undan skurðviðgerðini.

## Viðtala við sjúkrarøktarfrøðing

Ein sjúkrarøktarfrøðingur tosar við tygum og leggur sjúkrarøktina til rættis soleiðis, at tygum kunnu hava tað so gott sum til ber. Eisini verður vegleitt um, hvussu tygum kunnu fyrireika tygum til skurðviðgerðina, og um hvat tygum kunnu vænta tygum í sambandi við hana. Heimferðin verður eisini fyrireikað við atliti at tørvi og umstøðum.

## Viðtala við narkosulækna

Í samráð við tygum ger narkosulæknin av, hvussu gjørt verður við narkosu/doyving. Greið honum frá, hvørjar royndir tú hevur havt fyrr av narkosu/doyving.

## Onnur umráðandi fyrireiking

- Roynið at vera so væl fyri kropsliga sum til ber. Mælt verður til, at tygum eru úthvíld undan skurðviðgerðini. Tað minkar um strongdina og ger, at tygum kenna tygum betur eftir skurðviðgerðina.
- Drekkið ikki alkohol og brúkið einki tubbak av nøkrum slag í 4 vikur undan skurðviðgerðini. Royking veikir mótstøðuførið í kroppinum (immunverjuna) og ávirkar eisini virksemið hjá lungunum.
- Best er ikki at taka náttúruheilivág og lýsi undan skurðviðgerðini.
- Keypið tygum pínutablettir, áðrenn tygum verða løgd inn til skurðviðgerð.
- Helst skulu tygum ikki eta nakra tunga máltíð dagin fyri skurðviðgerðina. Føðsluríkur matur hevur góða ávirkan á mótstøðuførið í kroppinum, og somuleiðis er gott at taka C-vitaminir undan skurðviðgerðini. Hetta hevur eisini góða ávirkan á grøðingina.
- Til at minka um vandan fyri bløðing í sambandi við skurðviðgerð, er best ikki at taka heilivág, sum hevur acetylsalicylsýru (t.d. Magnyl, aspirin) í eina viku undan skurðviðgerðini. Tekur tú annan blóðtynnandi heilivág, t.d. av tí at tú onkuntíð hevur havt blóðtøpp, er umráðandi, at tú sigur læknanum frá.

## Undan skurðviðgerðini

- Blóðtynnandi heilivágur verður givin undir húðina til at forða fyri blóðtøppi, men uttan at vandin fyri bløðing veksur. Verður blóðtynnandi heilivágur givin undan skurðviðgerð, verður tað gjørt millum kl. 17 og 18 kvøldið fyri skurðviðgerðina. Eftir skurðviðgerðina verður blóðtynnandi heilivágur givin um kvøldið sama dag sum skurðviðgerðin verður gjørd.
- Millum kl. 20 og 21 mugu tygum taka skarnloysandi evni (Klyx) til at reinsa niðasta part av tørmunum. Um opningur er í lagi, er óneyðugt at brúka klyx, um tygum ikki verður rátt til tað.
- Helst skulu tygum bert eta lættan nátturða og lætta føði, áðrenn tygum leggja tygum.
- Etið ikki fasta føði eftir kl. 2 um náttina undan skurðviðgerðini.
- Klárir drykkir kunnu drekkast í smáum í upp til 2 tímar undan skurðviðgerðini. Klárir drykkir

eru angaleysir drykkir við ongum feitti og ongari mjólk í, eitt nú vatn, klár fruktsaft (við ongum frukttægrum), te og kaffi. Av tí at skurðviðgerðartíðin ikki verður endaliga ásett, fyrr enn sjúklingurin er komin á deildina, má helst einki verða drukkið eftir kl. 06.

- Roykt verður ikki eftir midnátt. Royking økir vandan fyri, at tvørleikar kunnu standast av narkosuni.
- Tygum mugu ikki roykja ella brúka annað tubbak, tyggja tyggigummi ella eta bomm seinastu tveir tímarnar undan skurðviðgerðini.
- Tygum skulu fara í brúsubað um morgunin tann dagin, sum skurðviðgerðin verður gjørd. Skurðviðgerðarøkið skal verða vaskað væl og nalvin verða reinsaður.
- Neglalakk og andlitssmyrsl skal fáast av og deodorant, krem, oljur ella annað luktilsi má ikki verða smurt á húðina undan skurðviðgerð.
- Best er at lata skartgripir og annað virðismikið liggja eftir við hús.

## Skurðviðgerðardagurin

Tygum koma á kvinnudeild 21-A í kvinnudeildarhúsinum kl. 7:30. Stutt áðrenn farið verður undir skurðviðgerðina, fáa tygum pínustillandi tablettir sum part av fyrireikingini til viðgerðina, og nalvin verður reinsaður við sóttreinsandi evni. Ygum verða flutt á skurðstovuna í song, og har tekur starvsfólkið á skurðdeildini ímóti tygum. Í summum førum verður dropp lagt í ryggin við pínustillandi dryppi eftir skurðviðgerðina (epidural doyving). Narkosulæknin tosar við tygum um tað.

## Skurðviðgerðin

Skurðviðgerðin fer fram, meðan tygum eru í narkosu, og tekur 1-2 tímar.
Lívgøgn, sum verða tikin, verða send til vevnaðargreining.

### Vandin fyri, at tvørleikar taka seg upp undir og eftir skurðviðgerð

Í sambandi við hvørja skurðviðgerð, sum er, er vandi fyri, at tvørleikar kunnu taka seg upp bæði undir og eftir skurðviðgerðina, men vandin í sambandi við undirlívskurð er lítil. Kortini kann vandi vera á ferð hjá einstaklingum, sum fyrr hava verið skurðviðgjørdir í undirlívinum og hava samangrógvingar í undirlívinum ella hava fingið ígerð (infeksjón) ella knyklar í undirlívið.

Størstu vandarnir í sambandi við hesa skurðviðgerðina eru ígerð og bløðing. Allar kvinnur fáa ein skamt av antibiotika til at forða fyri ígerð. Hevur tú sukursjúku, brúkar tú alkohol ofta, vigar tú væl oman fyri viðmælta vekt, ella um tú roykir, er vandin fyri ígerð størri og sár grógva seinni og verri.

Tað er ikki óvanligt at fáa fepur teir fyrstu dagarnar eftir skurðviðgerðina. Oftast eru ongar áneyðir at viðgera fepurin, av tí at er talan ikki um ígerð, men eitt natúrligt aftursvar hjá kroppinum til skurðviðgerðina.

Í onkrum førum kann orsøkin tó vera ígerð í skurðviðgjørda økinum. Um so er, kann verða neyðugt at viðgera tygum við antibiotika.

Bløðing kann altíð koma fyri undir ella eftir skurðviðgerðina. Viðhvørt kann verða neyðugt at geva blóð undir ella eftir skurðviðgerðina.

Eisini kann henda, at landbløðran og/ella endatarmur verða meiðslað, men slíkt kemur sjáldan fyri. Í allarflestu førum hevur hetta ongar langtíðaravleiðingar við sær.

Í sambandi við stóra skurðviðgerðir kann vandi vera fyri blóðproppi. Til at forða fyri tí er umráðandi at røra seg so skjótt sum til ber eftir skurðviðgerð. Vit geva tygum eisini blóðtynnandi heilivág í einar 4 – 12 tímar eftir skurðviðgerðina til at forða fyri blóðproppi.

# Eftir skurðviðgerðina

Eftir skurðviðgerðina verða tygum flutt á eina viðrakningarstovu, har tygum kunnu koma tygum eftir skurðviðgerðina. Har ansar ein sjúkrarøktarfrøðingur eftir tygum í nakrar tímar, áðrenn tú verður flutt aftur á kvinnudeildina.

## Pína

Tygum fáa pínuheilivág til at minka um pínu og lætta um rørslu. Pínuheilivágur verður givin eftir tørvi hjá hvørjum sjúklingi sær. Umráðandi er, at tygum siga sjúkrarøktarfrøðinginum frá, hvussu tygum eru fyri, so at pínan kann verða viðgjørd so skjótt, tørvur er á tí. Tá ið ætlað verður um pínu, verður mált eftir einum stiga, sum gongur frá 0, t.e. eingin pína til 10, t.e. er ringasta pína (ótolandi).

Um tú hevur fingið dropp í mønuharðserkin (ryggin) fyri pínu (epidurala doyving) hevur tú tað í tey næstu tvey samdøgrini.

## Føði

Tygum verða fastandi og fáa vætu í æðr beint eftir skurðviðgerðina. Tygum kunnu fáa vaml eftir narkosuna, og tá fáa tygum heilivág fyri vaml eftir tørvi. Umráðandi er at siga sjúkrarøktarfólki frá, hvussu tygum eru fyri. Hava tygum ikki vaml, fáa tygum vatn at drekka um kvøldið dagin sum skurðviðgerðin verður gjørd og flótandi føði morgunin eftir, áðrenn tygum sleppa at eta fasta føði. Tá ið farið verður eta aftur eftir skurðviðgerðina, skulu tygum rokna við at verða plága av luft í tørmunum. Hetta kemst av, at sodningin broytist, og tað kann vara í nakrar dagar. Tá er frægast at halda seg frá mati, sum gevur luft, eitt nú káli, bønum, rugbreyði, leyki, gajoli (hálspastillum) og tyggigummi. Etið oftari og lítið í senn, fáið tygum at drekka millum máltíðir og ikki afturvið og far stuttar gongutúrar.

## Landrør (katetur)

Undir skurðviðgerðini verður eitt landrør (katetur) lagt upp í bløðruna, og tað verður tikið úr aftur dagin eftir ella í samráð við læknan. Hetta verður gjørt til at hava eftirlit við landúrskiljing beint eftir skurðviðgerðina og so eisini til umlættingar hjá tygum, av tí at tygum fara at hava ilt við at røra tygum

tað fyrsta samdøgrið. Eftir at landrørið (katetur) er tikið úr, verður eftirlit havt við vatnlátinum eitt skifti, og mált verður, hvussu væl landbløðran tømir seg. Hetta verður gjørt við einum lítlum sonartóli, sum verður sett á búkin beint oman fyri kokubeinið og mátar innihaldið í landbløðruni.

### Rørsla

Longu um kvøldið tann dagin, sum skurðviðgerðin verður gjørd, fáa tygum hjálp at fara upp úr songini. Umráðandi er at gera andingar- og fótvenjingar fyrsta samdøgrið. Andingarvenjingar hjálpa til at loysa slím úr lungunum og beinvenjingar økja um blóðrenslið í beinunum og minka um vandan fyri blóðtøppi.

### Skurðsár

Ein sjúkrarøktarfrøðingur hevur eyguni eftir skurðsárinum og bløðing úr tí. Bind verður lagt á sárið teir fyrstu tríggjar dagarnar. Tygum kunnu fara í brúsu tveir dagar eftir skurðviðgerðina uttan at hava bind á sárinum.

### Eym í hálsinum

Tygum kunnu hava fyri neyðini at fáa súrevni gjøgnum nøsina, meðan tygum koma tygum eftir narkosuna.

Undir skurðviðgerðini verður eitt barkarør sett niður í hálsin til at halda andaleiðini opnari. Tað kann hava við sær, at tygum verða eym í hálsinum ella fáa hálsbrunaeyðkenni teir fyrstu tveir dagarnar.

### Bløðing úr móðurskeið

Roknast má við bløðing úr móðurskeiðini eftir skurðviðgerðina, og um so er, hevur ein sjúkrarøktarfrøðingur eyguni við bløðingini.

## Útskriving

Tygum kunnu rokna við at verða útskrivað av deildini tríggjar til fýra dagar eftir skurðviðgerðina ella í samráð við lækna. Ein sjúkrarøktarfrøðingur gevur tygum upplýsingar og leiðbeiningar viðvíkjandi heimferð. Tygum fáa úrslitið av vevnaðargreiningini við tygum, um tað er tøkt, um ikki, verður samband havt við tygum, eftir at tygum eru heimkomin. Minnist til at biðja um læknaváttan, um tygum tørvar hana.

### Pína

Eftir at tygum eru útskrivað, kunnu tygum fáa pínu ella stingir í undirlívið. Tað er natúrligt at fáa eitt sindur av pínu, men umráðandi er at taka pínutablettir regluliga teir fyrstu 5-6 dagarnar eftir skurðviðgerðina og síðan eftir tørvi. Hetta er fyri at minka um pínu og stingir og til at lætta um rørslu. Ofta hjálpir at taka brunalinnandi heilivág, sum eitt nú Ibufen, eftir skurðviðgerðina. Tú skalt tó ikki taka brunalinnandi heilivág, um tú fyrr hevur havt bruna í maga ella magasár. Sig lækna ella sjúkrarøktarfrøðingi frá um so er.

## Skurðsár
Yvirhøvur verða skurðsár latin aftur við klipsum, sum verða tikin úr aftur 7 – 10 dagar eftir skurðviðgerðina. Tygum fáa tíð til at taka klipsini úr, tá ið tygum verða útskrivað. Eitt skurðsár tekur nakrar vikur at grógva saman. Tað er tí einki óvanligt í, at tygum kunnu fáa stingir í skurðin ella, at hann er eymur. Økið uttan um skurðsárið kann gerast kensluleyst. Hetta kemst av, at undir skurðviðgerðini verða ymsar smáar nervar í húðini kvettar av. Kensluloysið uttan um skurðviðgjørda økið kann vara í nakrar vikur eftir skurðviðgerðina. Tað ber væl til at fara í bað í baðikari eina viku eftir skurðviðgerðina, um skurðurin er væl afturlatin og eingin bløðing er.

## Bløðing og kynslív
Tá ið lívmóður og lívmóðurhálsur eru tikin, steðgar mánasjúkan. Verður lívmóðurhálsurin ikki tikin, kunnu smáar bløðingar koma fyri mánaðarliga. Tað kemur tó bert fyri hjá heilt fáum kvinnum. Bløðing úr móðurskeiðini er ymist frá einari til aðra og kann vara í 1 – 2 vikur. Bløðingin er vanliga lítil, t.e. hon er minni enn í sambandi við vanliga mánasjúku. Í fyrstuni er blóðið reydligt, men broytist so til eitt reyðbrúnligt útflot. Um útflotið luktar illa (fiskaluktur) skulu tú seta tygum í samband við deildina. Pentur, sum eru ovast í móðurskeiðini, hvørva av sær sjálvum upp á 4 – 6 vikur eftir skurðviðgerðina, og tá kunnu tygum rokna við brúnligum útfloti. Reinføri er umráðandi, og tygum skulu fara í brúsu ta fyrstu vikuna, ikki í karbað. Brúka heldur bind enn tampongir.

Eru tygum ikki farin um skiftisaldur, halda eggrøturnar fram at gera hormon, og tygum fáa framvegis eggloysn. Tískil fara somu mánaðarligu broytingar at henda í kroppinum sum fyrr, men tygum bløða ikki.

Verður egggørn tikin, og tygum ikki eru farin um skiftisaldur, kann henda, at tygum mugu fáa hormonviðgerð eftir skurðviðgerðina.

Skurðviðgerðin broytir ikki móðurskeiðina, hon verður líka gyrðin (elastisk) og líka long sum undan skurðviðgerðini. Tað merkir, at tygum ikki merkja nakra broyting, hvat kynslívi viðvíkur. Tygum kunnu hava kynsliga samveru aftur 4 – 5 vikur eftir skurðviðgerðina. Eru egggarnar tiknir, kann tað hava við sær, at móðurskeiðin ikki verður vát. Tí kunnu tygum gerast eym í móðurskeiðini av samlegu, og tí er umráðandi at brúka vætukrem (glíðikrem) til at mýkja móðurskeiðina. Slíkt vætikrem fæst í øllum apotekum. Eisini fáast staðbundin hormon til móðurskeiðina, men tey fáast bert við resept.

## Arbeiði og rørsla
Mælt verður til at halda frí frá arbeiði í 4 – 5 vikur. Men alt veldst um aldur og sálarliga støðu, og hvat arbeiði tygum hava. Tygum mugu ikki lyfta tungar lutir (yvir 10 kg) tær fyrstu 3 vikurnar eftir skurðviðgerðina. Tygum mugu heldur ikki leggja ov nógv fyri tær fyrstu 3 – 4 vikurnar eftir skurðviðgerðina, íðkið ikki stimburfimi (aerobics), spælið ikki tennis, svimjið ikki ella gerið einki tungt húsarhaldsarbeiði. Vandaleyst er tó at íðka lættari ítrótt og farið gongutúrar beint eftir skurðviðgerðina, um tygum halda tygum til. Tað er ikki óvanligt at kenna seg troytta og hava størri svøvntørv eftir skurðviðgerðina. Minnist til, at hvíld er líka umráðandi sum rørsla.

## Vatnlát

Broytingar í sambandi við vatnlát kunnu koma fyri eftir skurðviðgerðina. Tygum kunnu hava ilt við at kasta tygum av vatninum og tøma bløðruna. Hetta eru oftast tíðaravmarkaðar avleiðingar av skurðviðgerðini og legna seg aftur, tá ið tygum fara at styrkjast aftur. Umráðandi er tí at hava góðar vesi-vanar. Farið regluliga á vesið allan dagin eina ferð annan hvønn ella triðja hvønn tíma og gevið tygum góðar stundir at tøma bløðruna. Tygum skulu drekka nógv um dagin, tí fáa tygum ov lítla vætu í tygum, kann vætutrotið ørkymla og elva sviða í landbløðruni.

Í mongum førum kunnu linir kokubotnsvøddar elva til broytingar í vatnláti eftir skurðviðgerðina. Kokubotnsvøddarnir gera botnin í mjadnargrindini og halda uppi og styðja lívgøgnini í kokuni, t.e. endatarmin, móðurskeiðina og landbløðruna. Umráðandi er tí, at tygum gera kokubotnsvenjingar 4-5 vikur eftir skurðviðgerðina. Tú finnur teir røttu vøddarnar, um tú steðgar sprænínum, tá ið tú pissar. Tygum kunnu eisini fáa bóklingar um kokubotnsvenjingar og fáa vegleiðing um venjingar frá einum sjúkrarøktarfrøðingi ella fysioterapeuti.

## Opningur

Tygum kunnu fáa harðan opning eftir skurðviðgerðina. Umráðandi er tí at røra seg regluliga, eta regluliga, eta mat við tægrum í, frukt og grønmeti og drekka nógv vatn. Viðhvørt kann vera neyðugt at taka opningsmýkjandi upploysing (sorbitól/parafin/HUSK) eftir skurðviðgerðina.

## Eftirkanning

Eftirkanning fer vanliga fram 6-8 vikur eftir skurðviðgerðina á eini dagdeild (ambulatorium) ellahjá tygara egna lækna.

## Kenslulig árin

Tað er ikki óvanligt at uppliva kenslulig sveiggj eftir skurðviðgerðina. Tygum kunnu kenna tygum glaða, illa, viðkvæma ella dapra alt í senn. Matarlystur, svøvnlag og arbeiðsorka kunnu broytast eina tíð, og hetta hevur alt ávirkan á, hvussu tú hevur tað. Ofta standast hesi árinini av strongd eftir skurðviðgerðina og narkosuna og eru tí tíðaravmarkað. Umráðandi er tí at geva sær stundir at hvíla og taka sær av løttum. At vera úti í frískar luft og røra seg javnan ger eisini sítt til, at tygum verða betur fyri andliga og fáa frið í sinnið. Aftra tygum ikki við at biðja um ta hjálp, sum tygum hava tørvar, og tosið um støðu tygara og kenslur við tann, sum tygum hava álit á. So ber eisini altíð til at fáa viðtalu hjá einum sosialráðgeva ella einum sálarfrøðingi, um tygum halda, at tørvur er á tí

## Setið tygum í samband við Kvinnudeildina:

- um tygum fara at bløða verri enn vanligt er
- um tygum fáa meiri fepur enn 38*
- um tygum fáa útflot, sum luktar illa
- um tygum fáa ringa pínu í undirlívið, sum pínutablettir ikki kunnu linka
- um tygum fáa sviða ella pínu oman fyri kokubeinið og ofta vilja pissa
- um skurðsárið verður eymari, ella tygum verða varug við at væta setur úr tí, ella at tað verður reytt, hovnar ella hitnar

**Telefon: 543-3266 ella 543-3265 millum kl. 8 - 16 yrkadagar**
Aðrar tíðir kunnu tygum seta tygum í samband við Kvinnudeild 21-A telefon 543-3263 allar yrkadagar til klokkan 20 fríggjadag. Eftir tað og til klokkan 07 mánamorgun kunnu tygum seta tygum í samband við Skaða- og bráðfeingisdeildina á Landshospitalinum telefon 543-1000.

Taka trupulleikar seg upp, ella ivast tygum í onkrum, eru tygum vælkomin at ringja á B3

Skurðambulatoriið telefon 304500 og biðja um lokal 5400

Socialráðgevi á LS-------------------------------------354000 lokal 6330

Sálarfrøðingur hjá Krabbameinsfelagnum kl 13-15----317959

Prestur knýttur at LS Sverrir Steinhólm-------------321313/ 321323/ 210773

Vit vilja, at tygum hava tað so gott á sjúkrahúsinum sum yvirhøvur gjørligt. Um tygum hava onkrar spurningar ella gera tygum stúringar um støðuna, eru vit altíð til reiðar at tosa við tygum.

Við ynskjum um góðan bata!

Starvsfólkið á Kvinnudeildini.


HØVUNDAR OG ÁBYRGDARAR:

HRUND MAGNÚSDÓTTIR,
SJÚKRARØKTARFRØÐINGUR 21A

HARPA HILMARSDÓTTIR,
SJÚKRARØKTARFRØÐINGUR 21A

YVIRUMSJÓN:
ANNA Þ. SALVARSDÓTTIR, LÆKNI Í KVINNUSJÚKUM OG
HANNA KRISTÍN GUÐJÓNSDÓTTIR,
STJÓRI Á SJÚKRAFRØÐIDEILD.



ÚTGEVARI:
LANDSPÍTALI – HÁSKÓLASJÚKRAHÚS
KVENLÆKNINGADEILD 21A

DESEMBER 2008 – FYRSTA ÚTGÁVA

ÞÝÐING:
SPROTIN.FO

HÖNNUN:
KYNNINGARMÁL LSH/ÁJC

LANDSPÍTALI
HÁSKÓLASJÚKRAHÚS